# Leitaðu eftir vilstum manni

**Sunnudagin fór Eysturoyar gongufelag ein gongutúr á Viðoynni. Ein maður bleiv burtur frá teimum, og avgjørt varð at senda tyrluna út at leita. Men tað vísti seg tíbetur bert, at maðurin var vilstur, og hann kom aftur íaftur í øllum góðum**

LØGREGLUTÍÐINDI
*Solby A. Eliasen*

Tað var beint eftir døgurða tíð, at farið var úr Dølum og til gongu. Leiðin gekk fyrst upp á Sundsskarð. Tá fólk komu hagar, varnaðust tey, at ein teirra manglaði. Farið varð so aftur at leita eftir honum. Tey gingu eitt fitt petti aftur eftir somu leið og róptu eisni á hann, men har var ongin maður. Løgreglan fekk boðini klokkan hálvgum sjey, at ein maður var burturblivin. Tveir tímar seinni var framvegis onki lívstekn frá manninum, og tí varð gjørt av at senda boð eftir tyrluni, sum fór at leita beinanvegin. Um tíggjutíðina fór tyrlan at bunkra, og tá hevði løgreglan eisini sent boð eftir hundunum úr Havn og bjargingarfelagið stóð somuleiðis tilbúgvið at fara at leita. Men tað gjørdist ikki neyðugt, tí stutta løtu eftir komu boð um, at maðurin var komin aftur íaftur í øllum góðum og var staddur inni í Dølum – sama stað sum gongutúrurin byrjaði.

Maðurin megnaði ikki at fylgja við hinum í gongulagnum, og tí kom hann afturút. Hann royndi at ganga sum frægast, men hann viltist á leiðini, og tí kom hann so langt burtur frá hinum. Hann gekk so ein annan veg. Peilaði seg inn á Villingardalsfjall, gekk so um Myrnafjall og oman aftur í Dalar.

Sostatt fekk hann ein langan gongutúr, hóast honum ikki eydnaðist at koma upp um Sundsskarð. Vakthavandi á løgreglustøðini í Klaksvík letur væl at arbeiðinum og tilbúgvingini til at fara í gongd við leitingina, sum tíbetur ikki varð neyðug hesuferð.

### Friðarligt

Annars sigur vakthavandi, at vikuskiftið í Klaksvík hevur verið stak friðarligt. Ein rúgva av fólki var í býnum leygarkvøldið. Konsert hevði verið, og diskotek og dansur vóru fleiri staðir í býnum. Hóast tað, so var ikki tað stóra hjá løgregluni at gera.

Ein rútur var brotin í einum bakarahandli. Løgreglan hevur varhugan av, hvør tað kann vera, sum hevur framt hetta herverkið.

# Maður skorin í hálsin í Havn

**Fríggjadagin var ein maður skorin í hálsin í Havn. Maðurin er ikki í lívsvanda, men vakthavandi sigur, at talan er um groft vold, og ein maður er varðhaldsfongslaður í 14 dagar fyri ógerðina. Annars hava onnur smávegis herverk verið í høvuðsstaðnum um vikuskiftið**

LØGREGLUTÍÐINDI
*Solby A. Eliasen*

Fríggjakvøldið stutt fyri midnátt fekk løgreglan boð um, at ein maður var skorin í hálsin av einum øðrum. Maðurin varð fluttur á landssjúkrahúsi.
Vakthavandi sigur, at tann álopni fekk ein skurð í hálsin upp á umleið tíggju cm. Løgreglan hevur handtikið ein mann fyri álopið, og hevur hon so mikið góð prógv, at maðurin er varðhaldsfongslaður í 14 dagar og situr í isolatión.

– Talan er um gamlar kenningar hjá okkum, sigur vakthavandi og leggur afturat, at tað ikki er talan um ung fólk, men heldur tilkomin, sum hava fingið ov nógv niðurum, og so var ilt komið ímillum teir.

Í sambandi við, at ein ungur italienari varð stungin niður á Nørrebro fyrr í hesum mánaðinum, er ljóskastarin av álvara settur á kníválop í Danmark, sum tykjast at vinda upp á seg. Vakthavandi á løgreglustøðini í Havn heldur tó ikki, at ein kann siga, at tað sama er við at henda í Føroyum.

– Hetta er sum sagt gamlir kenningar hjá okkum, og tískil haldi eg ikki, at tað kann samanberast við tað, sum fer fram í Danmark fyri tíðina, sigur løgreglan.

### Herverk

Fleiri herverk hava verið í høvuðsstaðnum um vikuskiftið. Vakthavandi sigur, at sunnudagin byrjaðu fráboðaninar, sum vanligt, at koma inn um ymiskt, sum er framt um vikuskiftið.

Ein maður varð sligin frammaná í Club 20. Maðurin breyt bæði nøsina og eina tonn. Vakthavandi sigur, at løgreglan hevur onkran, sum teir ætla at tosa við í sambandi við hetta.

Ein røð av herverkum vórðu framd í Teledeplinum, Thomas Dam Búnýti og tann vegin. Ein rútur varð brotin á einum bili á Gripsvegnum.

– Tað kundi týtt uppá, at tað er ein rundferð, sum er farin fram har, sigur vakthavandi.

Og so var eitt herverk framt í Tjørnuvík eisini. Heldur sjáldsamt, sambært vakthavandi. Men har var so onkur, sum hevði smurt eina hurð inn í máling.

Ein maður var so óheppin at detta á súkklu síni á Velbastað. Maðurin var einsamallur og breyt seg sundur, men hann kom so undir læknahond og fekk ta neyðugu hjálpina.




# Góðir bankaroknskapir

Amerikanska framhaldssøgan um tær bjørtu búskaparligu uppgerðirnar, sær ikki út til at steðga enn. Hóast fáar uppgerðir vóru í farnu viku, vóru tær aftur hesuferð sum heild bjartar. Millum annað sást, at talið av teimum, sum fyri fyrstu ferð søkja um dagpening í USA, aftur gjørdist lægri enn 400.000. Er talið lægri enn 400.000 bendir tað á, at tað gongur framá á amerikanska arbeiðsmarknaðinum. Tó kann streymslitið, vikuna frammanundan, hava ført við sær, at ikki allar dagpeningaumsøknirnar eru skrásettar.

Hóast nakað av rørslu var í lánsbrævarentunum í farnu viku, endaðu renturnar á leið á sama stigi, sum vikuna frammanundan. Ikki fyrr enn betraða støðan á amerikanska arbeiðsmarknaðinum verður enn meira sjónlig, og hon sostatt verður ein trygd fyri veruligari búskaparligari framgongd, vilja lánsbrævarenturnar hækka meira. Hetta verður tó neyvan fyrr enn í vetur.

Norðurlendsku partabrævamarknaðirnir vóru í farnu viku merktir av, at peningastovnarnir kunngjørdu roknskap. Sum heild kundu allir vísa á góðan roknskap, kanska serliga Svenski Handilsbankin, sum í ársfjórðinginum økti um netto rentuinntøkurnar við 17% til 4,91 milliardir svenskar krónur, hóast rentumarginalurin, orsakað av lága rentustiginum, er fallin.

Fríggjadagin í farnu viku komu tíðindir frá Intel um, at tey høvdu hækkað metingarnar um sølu og inntøkur fyri 3. ársfjórðing. Hetta hevði positiv árin á partabrævamarknaðirnar, men seinni fríggjadagin fóru partabrævaeigarar at staðfesta vinning. Orsøkin er, at partabrøv eru hækkaði munandi seinastu tíðina, og at búskapirnir mugu taka meira dik á seg, áðrenn partabrøv kunnu bróta upp úr verandi kursstiginum. Sostatt er støðan á amerikanska búskapinum aftur ein gekkur á hesum økinum.

Nógvar spennandi hendingar fara fram hesa vikuna, sum kunnu føra við sær rørslur á bæði láns- og partabrævamarknaðunum. Millum annað heldur Alan Greenspan røðu fríggjadagin, men væntað verður, at hann endurtekur, at framá gongur í amerikanska búskapinum. Fyritreytirnar fyri hvønn vegin renturnar skulu flytast eru kortini óbroyttar. Lutfalsliga høga stigið gevur boð um, at renturnar skulu lække, meðan áhaldandi bjartar búskaparligar uppgerðir siga, at renturnar skulu vera óbroyttar ella hækka. Mett verður at gongdin, har renturnar sveiggja í einum avmarkaðum talstrekki heldur fram nakað enn.

| Rentur | | | | Partabrævavísitøl | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Diskonto | 2,00% | 0,00% | → | KFX, Danmark | 237,1 | 1,7% | ↑ |
| 2 ára lánsbrøv | 2,94% | 0,03% | ↑ | OMX, Svøríki | 591,9 | 1,1% | ↑ |
| 5 ára lánsbrøv | 3,70% | 0,02% | ↑ | DJ Stoxx 50, Evropa | 2.513,1 | -0,4% | ↓ |
| 10 ára lánsbrøv | 4,37% | 0,00% | → | S&P 500, USA | 993,1 | 0,2% | ↑ |
| **Íløgufeløg** | | | | **Gjaldoyra** | | | |
| Lánsbrøv í DKK | 106,46 | 0,2% | ↑ | USD | 681,25 | 2,2% | ↑ |
| Evru Lánsbrøv | 164,18 | -0,1% | ↓ | EUR | 743,24 | 0,0% | → |
| Norrøn Partabrøv | 69,24 | 3,2% | ↑ | GBP | 1.074,46 | 1,3% | ↑ |
| Altjóða Partabrøv | 74,06 | 3,1% | ↑ | NOK | 89,41 | 0,3% | ↑ |

*Renta og kursir kl 10 ígjár. Broytingar eru útroknaðar í mun til fyri viku síðan.*



**UTTAN ÚR HEIMI**

# Friðurin krevur fleiri mannalív enn kríggið


*Dagliga eru mótmæli ímóti amerikonsku hermonnunum í Irak. Her krevja shia-muslimar í býnum Bakuba, at amerikanararnir skulu fara úr Irak*

**Tá George W. Bush, forseti, tann 1. mai kunngjørdi, at sjálvt kríggið í Irak var liðugt, høvdu 138 amerikanskir hermenn latið lív. Nú er talið tvífaldað.**

IRAK
*Árni Joensen*

Sunnudagin kunngjørdi amerikanska herleiðslan í Irak, at tveir hermenn afturat høvdu latið lív í irakskum álopum.

Harvið hevur USA mist 137 hermenn í Irak síðani tann 1. mai. Tann dagin kunngjørdi George W. Bush, at sjálvt kríggið var liðugt og vunnið. Tann dagin hevði kríggið kostað 138 amerikonskum hermonnum lívið. Við teimum báðum, sum doyðu sunnudagin, hava amerikanararnir mist 275 hermenn, síðani Bush gav boð um at leypa á.

- Vit vistu alla tíðina, at tíðin aftan á kríggið fór at verða minst líka vandamikil sum sjálvt kríggið, men á ein annan hátt, sigur majorurin William Thurmond við tíðindastovuna AP. Hann er talsmaður hjá herleiðsluni og hevur støð í Bagdad.

- Undir krígnum bardust vit ímóti vanligum hermonnum, sum vóru skipaðir, og sum gingu í búna. Nú verða vit álopnir av øðrum stríðsmonnum, sum koma út út myrkrinum og leypa á menn okkara við vegjaðaran við rakettdrivnum granatum, bumbum og riflu, sigur Thurmond.

Samstundis siga amerikanskir hernaðarfrøðingar, at tað fer at kosta USA nógv mannalív afturat at vinna friðin í Irak.

# Jødiskir niðursetumenn hava eisini sín yvirgangsfelagsskap

**Seinastu dagarnar hevur ísraelska trygdartænastan tikið níggju jødiskar niðursetumenn, sum eru skuldsettir fyri at hava søkt at fleiri palestinskum málum.**

ÍSRAEL
*Árni Joensen*

Ísraelsk bløð avdúkaðu í gjár, at tað eru ikki bara palestinar, sum fremja yvirgang. Víðgongdir jødiskir niðursetumenn hava eisini sín yvirgangsfelagsskap og hava skipað fyri fleiri álopum á palestinar.

Sambært bløðunum hava ísraelskir og palestinskir myndugleikar leitað eftir teimum jødisku yvirgangsmonnunum leingi. Bæði ísraelsmenn og palestinar hava lagt niðursetumenninar undir at hava myrt minst níggju palestinar, og í fleiri førum er avdúkað, at teir hava roynt at spreingja palestinskar skúlar í luftina.

Í juli kom gongd á avdúkingarnar, tá ísraelska løgreglan handtók tveir niðursetumenn. Í bili teirra fann løgreglan nógv spreingievni av tí slagnum, sum ísraelski herurin nýtir.

Síðani eru níggju niðursetumenn tiknir, og felags fyri teir allar er, at teir eru fyrrverandi hermenn í ísraelska herinum, skrivar blaðið Haaretz. Keldur í trygdartænastuni siga fyri blaðnum, at menninir vóru snigskjúttar í herinum, og at teir eisini høvdu góðan kunnleika til evnafrøðilig vápn og spreingievni.

Ísraelska løgreglan fekk av álvara illgruna til yvirgangsfelagsskapin hjá niðursetumonnunum, tá ein bumba varð funnin við ein palestinskan gentuskúla í Eysturjerusalem í apríl. Spreingievnið stavaði fyri ísraelska herinum. Seks vikur frammanundan doyði ein palestinskur drongur, tá ein bumba brast uttan fyri ein skúla í bygdini Tzur Baher. Eisini tað spreingievni stavaði frá ísraelska herinum.

Hetta er ikki fyrstu ferð, at jødiskir niðursetumenn hava framt yvirgang í palestinskum øki. Tað sama hendi í áttatiárunum, skriva ísraelsku bløðini.

## Stórt arbeiðsloysi í fiskiídnaðinum

Arbeiðsplássini í norska fiskiídnaðinum eru so nógv fækkað tað seinasta árið, og í fleiri fiskivinnuplássum ligggur arbeiðsloysi um tíggju prosent.

Á fleiri fiskavirkjum standa maskinurnar stillar, og gongdin tykist halda fram, sigur norska útvarpið. Aðalskrivarin í fakfelagnum hjá flakafólkunum, Hans Johan Dahl, sigur við útvarpið, at síðani 1. januar í fjør hevur sætta hvørt fólk í fiskiídnaðinum kist arbeiðið. Hann finst hvassliga at stjórnini í Oslo og leggur hana undir miðvíst at beina fyri fiskavirkjunum kring landið.

Sambært Hans Johan Dahl fáa fiskavirkini alt ov lítlan fisk, og hann vil tí hava stjórnina at noyða trolararnar at landa til virkini, so fólk kunnu sleppa aftur til arbeiðis.

## Eingir hermenn til Irak

Týskland fer ikki at senda hermenn til Irak at hjálpa amerikanarum og bretum. Tað sigur uttanríkisráðharrin, Joschka Fischer.

Fioscher, sum var á vitjan í Finnlandi um vikuskiftið, segði í Helsingfors, at tað áliggur amerikanarum og bretum at tryggja frið í Irak, tí tað eru teir, sum hava hersett landið. Hann vísti á, at týska stjórnin bardist sum úlvur á skóg fyri, at ST skuldi standa fyri arbeiðinum at endurreisa Irak, men at USA segði nei. Tí hava teir og bretar ábyrgdina nú, segði Joschka Fischer.

Finnland fer heldur ikki at senda hermenn til Irak. Uttanríkisráðharrin, Erkki Tuomioja, segði aftan á samráðingarnar við Fischer, at Finnland hevur somu støðu til Týskland. USA og Bretland hava ábyrgdina av viðurskiftunum í Irak. Fær finska stjórnin haraftur-ímóti eina áheitan frá ST at senda hermenn til Irak, fer stjórnin at umhugsa tað, segði hann.

## Schwarzenegger í trupulleikum

Nógv bendir á, at veljararnir í amerikanska statinum hava ikki álit á filmsleikaranum Arnold Schwarzenegger kortini.

Schwarzenegger hevur stillað upp sum republikanskt valevni til guvernørvalið í Kalifornia, sum verður tann 7. oktober, og tær fyrstu veljarakanningarnar bendu á, at hann hevði møguleika at vinna valið. Men nú tykist vend vera komin í. Ein kanning hjá stóra blaðnum Los Angeles Times um vikuskiftið vísti, at bara 22 prosent av teimum spurdu ætla sær at atkvøða fyri "The Terminator". Hinvegin ætla 35 prosent at atkvøða fyri demokratiska varaguvernørinum. Hann eitur Cruz Bustamente.

Eygleiðarar í Kalifornia siga kortini, at veljararnir har skifta støðu í heilum. Tað sæst eisini í kanningini hjá Los Angeles Times, tí heili 46 prosent av teimum spurdu siga, at tað kann væl henda, at tey fara at hava eina aðra støðu tann 7. oktober enn nú.

## Kanna ísin

50 av teimum fremstu veðurfrøðingunum í heiminum koma í dag til Noregs, har teir skulu kanna, hvussu veðurlagsbroytingar ávirka ísin í teimum høgu norsku fjøllunum.

Granskararnir, sum eru úr USA, Kanada, Evropa og Aasia, eru við í einari altjóða verkætlan. Umframt at kanna, hvussu veðurlagsbroytingar tey seinnu árini hava ávirkað ísin í teimum høgu norsku fjøllunum, skulu teir eisini kanna, hvussu broytingar fyrr í tíðini hava ávirkað viðurskiftini. Tað eru heldur ikki bert fjøllini, sum verða kannað, tí granskararnir ætla sær eisini at vita, um og hvussu broytingar í veðurlagnum ávirka havstreymarnar.

Talskvinnan hjá veðurlagsráðstevnuni í Noregi, Monika Sandnes, sigur við Dagbladet, at granskararnir halda, at tað er menniskjan, sum er orsøk til, at tað hevur verið sjáldsama heitt um summarið tey seinastu árini og rættiliga lýtt um veturin. Sambært talskvinnuni hava hitabroytingarnar verið so stórar seinastu tjúgu árini sum ongantíð fyrr.